*TILHÚS sp/f er eitt virki, ið kann levera allar vørur til uttandura fasadur, so sum vindeygu, hurðar, fasadur, klædning, automatiskarhurðar, inngongdspartíir til byggivinnuna.*
*Harafturat kunnu vit levera glas til øll endamál, eitt nú innandura glasveggir til senturbyggjarí, trygdarglas o.s.fr.*

*Vit lervera úr timbur træ/alu, aluminium og plast til øll endamál..*
*TILHÚS hevur gjørt avtalur við teir fremstu veitarar á okkara leiðum. Vit kunnu tískil tryggja eina dygd, sum er væl omanfyri tað vanliga.*
*Øll produktir frá TILHÚS, yvirhalda teir nýggju "energinormar" frá EU, eins og øll produktir verða leverað, sambært teimum donsku reglum og krøvum um millum annað glas.*
*Út yvir hetta kann TILHÚS bjóða tekniskar loysnir, við tekningum (eisini 3D), berokningum, vindlast, dokumentatión á øllum okkara produktum.*








## PROJEKTERING:

TILHÚS kann bjóða tekniskar loysnir á útbjóðingarstøði til arkitektar, yvir vindeygu, hurðar, fasadir, soleiðis at loysnirnar verða gjørdar við teimum tekniskt møguligu frá byrjan. Tekningar verða gjørdar og kunnu hesar leverast sum PDF, DXF ella DWG.
Hetta gera vit fyri eina minni upphædd, men kunnu harvið standa inn fyri at loysnirnar eru góðkendar eftir donskum reglum, tá tað umfatar glas, vindlast, tættleika o.s.fr.

## VINDEYGU OG HURÐAR: Her er talan um timbur, træ/aluminium, aluminium ella plast.

**Timbur:**
Timburvindeygu/hurðar verða oftani nýtt, tá ið loysnin skal vera bílig. Men eisini her kann dygdin vera ymisk. Vit nýta bert kjarnutræ til okkara vindeygu/hurðar og er hetta av bestu góðsku.
Timburvindeygu kunnu fáast málaði ella ómálaði, men altíð eru vindeyguni/hurðarnar grundaði tvær ferðir.
Vit kunnu eisini levera timburvindeygu/hurðar úr eitt nú mahogni, eisini málaði ella ómálaði.
Timbur fæst í øllum litum.

**Aluminium:**
Skal tað vera slitsterkt og viðlíkahaldsfrítt bæði innan og uttan, so er aluminium loysnin. Við rustfríum besløgum sum standard, er hetta besta góðskan innan umráðið.
Tað ber til at fáa hesa loysnina, sum isolerað ella óisolerað.
Aluminium fæst í øllum litum.

**Træ/alu:**
Træ/alu er tann stórst veksandi framleiðsla av vindeygum/hurðum í Evropa. Træ/alu hevur tað heita timburi innandura og tað sterka aluminium uttandura, sum ger hetta til eitt sera vakurt produkt.
Træ/alu fæst í øllum litum.

**Plast:**
Plast er ein bíligari loysn enn aluminium og eru hesi produktir stórtsæð viðlíkahaldsfrí.
Møguleikarnir eru nógvir í uppbygnaðinum av plastvindeygum, so sum sprossar, síðuhongd, o.s.fr.
Plast fæst í úrvaldum litum.

## FASADUR:

TILHÚS hevur valt bert at levera fasadur úr aluminium og træ/alu.

**Træ/alu:**
Sum við hurðum og vindeygum, ber eisini til at fáa heitu útsjóndina innan, eins og uttandura at fáa tað slitsterka aluminium-produktið.

**Aluminium:**
Eins og hurðar/vindeygu er hetta tann mest viðlíkahaldsfría loysnin, tá tað snýr seg um fasadur. Hetta tilfarið er sera væl egna til tað føroyska veðurlagið. Oftani saman við beton og stálkonstruktiónum.

**Automatiskar hurðar:**
TILHÚS leverar automatiskar hurðar til øll endamál. Hetta kann vera til inngongdir til handlar, sentur, handikap íbúðir, hospitalir ella líknandi. Eisini tær væl umtóktu karusselhurðarnar vera veittar av TILHÚS.

**Inngongdspartíir:**
TILHÚS er sera frammalaga tá tað snýr seg um inngongdspartíir til handlar o.l. Øll partíir verða gjørd fyri at geva eitt so innbjóðandi "Look" sum tilber. Her eru nógv ymisk snið at velja í, soleiðis at kundin altíð fær ta røttu loysnina, við denti lagdan á, at tað er tekniskt gjørligt.

## KLÆDNINGUR: TILHÚS hevur valt at levera klædning úr "stál" tilfari. Aluminium, kopar, rustfrítt stál, titan og sink.

Klædningurin kann leverast, sum kassettir ella slættar plátur.
Klædningurin fæst í øllum litum.

TILHÚS

Postboks 102
Heiðavegur 72
FO 610 Saltangará
Føroyar

| | |
|---|---|
| Telefon | +298 448 206 |
| Faks | +298 448 207 |
| Mail.. | tilhus@tilhus.fo |
| Web. | www.tilhus.fo |